


www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 08 - 2013

# Stórt gassfund í Norðsjónum tekur oljuheim á bóli

Tað er ikki óhugsandi, at týska olju- og gassfyritøkan E.On kann hava gjørt størsta gassfundið í syðra partinum av Norðsjónum seinastu 15 árini. Hetta upplýsir stjórin fyri olju- og gasspartin hjá felagnum, Haakon Haaland sambært offshore.no. Talan er um Tolmount-leiðina í bretska partinum av Norðsjónum. Tað skulu gerast fleiri analysur av fundinum, men tað sær lovandi út. Týski orkurisin stendur fyri 50% av fundinum, meðan Dana Petroleum situr á hini helvtini. Tolmount-keldan liggur umleið 50 kilometrar frá bretsku eysturstrondini. Týska felagið fer nú at kanna ymsar útbyggingarmøguleikar. Frammanundan er felagið longu fyristøðufelag á trimum oljuleiðum, Babbage, Johnston og Rita. Tolmount-keldan vísir, at tað framvegis eru møguleikar at gera nýggj olju- og gassfund í hesum partinum av Norðsjónum.

